Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jenis Kristian av Rana, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Undirsjóvartunnil til Suðriar

Spurningar:

1. Stendur sitandi samgongu samd aftanfyri ta samtykt um Suðuroyartunnilin, sum farna landsstýrið legði fyri Løgtingið, og sum ein stórur partur av Løgtinginum samtykti 25. februar 2026?
2. Er landsstýrismaðurin vitandi um, um politiskar ella aðrar ætlanir eru um at fremja broytingar í samtyktu ætlanunum?
3. Veit landsstýrismaðurin at siga, hvussu gongst við fyrireikandi og projekterandi arbeiðinum, og um hetta gongur eftir ætlan?
4. Nær væntar landsstýrismaðurin, at lógaruppskot um Suðuroyartunnilin verður lagt fyri Løgtingið aftur?

Viðmerkinga:
Í fyrradagin var hálvársdagur, síðani Løgtingið, hin 25. februar 2026, við 26 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti samtykti løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Síðani hesa samtykt hevur nýggj samgongu og nýtt landsstýri tikið yvir. Ómetaliga, ja misteinkiliga lítið, vilja nøkur vera við, hevur hesar seks mánaðirnar verið at hoyrt um hesa týdningarmiklu og metstóru risaútbygging av føroyska undirstøðukervinum. Her verður hugsað um, at so gott sum ongi lívstekin eru hoyrd ella sædd um ætlanirnar, hvørki í samgonguskjalinum, løgmansrøðuni ella føroyska politiska orðaskiftinum sum heild.

á Løgtingi, 25. august 2026

Jenis av Rana